| Formula-deildin | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | v | t | | |
| | d | v | - | j | - | t | mál | mál | +/- | stig |
| 1 EB/S | 18 | 11 | - | 5 | - | 2 | 45 | 20 | 25 | 38 |
| 2 NSÍ | 18 | 10 | - | 5 | - | 3 | 39 | 21 | 18 | 35 |
| 3 HB | 19 | 9 | - | 6 | - | 4 | 41 | 31 | 10 | 33 |
| 4 KÍ | 19 | 8 | - | 8 | - | 3 | 42 | 25 | 17 | 32 |
| 5 B36 | 18 | 8 | - | 6 | - | 4 | 29 | 21 | 8 | 30 |
| 6 GÍ | 19 | 7 | - | 9 | - | 3 | 24 | 19 | 5 | 30 |
| 7 Skála | 19 | 6 | - | 4 | - | 9 | 25 | 21 | 4 | 22 |
| 8 VB/S | 19 | 3 | - | 4 | - | 12 | 17 | 54 | -37 | 13 |
| 9 B68 | 19 | 2 | - | 4 | - | 13 | 20 | 44 | -24 | 10 |
| 10 ÍF | 18 | 2 | - | 3 | - | 13 | 18 | 44 | -26 | 9 |

| 1. deild | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | v | t | | |
| | d | v | - | j | - | t | mál | mál | +/- | stig |
| 1 B71 | 19 | 14 | - | 3 | - | 2 | 80 | 20 | 60 | 45 |
| 2 AB | 19 | 14 | - | 1 | - | 4 | 54 | 24 | 30 | 43 |
| 3 LÍF | 19 | 12 | - | 3 | - | 4 | 53 | 21 | 32 | 39 |
| 4 TB | 19 | 12 | - | 3 | - | 4 | 36 | 27 | 9 | 39 |
| 5 HB | 19 | 8 | - | 3 | - | 8 | 55 | 41 | 14 | 27 |
| 6 KÍ | 19 | 8 | - | 2 | - | 9 | 41 | 55 | -14 | 26 |
| 7 FSV04 | 19 | 8 | - | 1 | - | 10 | 35 | 26 | 9 | 25 |
| 8 SÍ | 19 | 6 | - | 2 | - | 11 | 47 | 53 | -6 | 20 |
| 9 VB/S | 19 | 3 | - | 0 | - | 16 | 17 | 90 | -73 | 9 |
| 10 Royn | 19 | 0 | - | 2 | - | 17 | 13 | 74 | -61 | 2 |

**Formuladeildin**
20/8 NSÍ-HB Páll Augustinussen
20/8 KÍ-VB/Sumba Eiler Rasmussen
20/8 B36-EB/Str. Dag Vidar Hafsås
20/8 Skála-ÍF Jens P. Brattalíð
21/8 GÍ-B68 Petur Reinert

**1. deild menn**
19/8 B71-TB Anton Skoradal
19/8 KÍ-SÍ Ransin N. Djurhuus
19/8 Royn-FSV04 Páll Augustinussen
19/8 VB/Sumba-AB Lars Muller
19/8 LÍF-HB Jón S. Gleðisheygg

**1. deild kvinnur**
20/8 EB/Str.-HB Ørvar Jacobsen
20/8 B36-NSÍ Thorvald Petersen
20/8 AB-GÍ Mangus í Króki
20/8 SÍ-KÍ Jóhan H. Ellefsen

# B68 ætlar at stjala stig í Gøtu

**Hvørt stig telir hjá botnliðnum B68, sum mánakvøldið spælir ímóti GÍ í Gøtu. Tveir av mest royndu spælarunum hjá GÍ fáa ikki spæla vegna skaðar**



GÍ-B68
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Dysturin millum GÍ og B68 verður spældur í Gøtu mánakvøldið, og tá verða tað tvey lið í ymiskum støðum, sum skulu royna at vinna dystin.

GÍ hongur framvegis í teimum fremstu liðunum, hóast gøtumenn eru dragnaðir nakað. B68 stríðist hinvegin fyri lívinum í botninum, og hjá teimum telir hvørt stig.

– Vit hava tveir sera avgerandi dystir eftir ímóti ÍF og VB/Sumba, men vit ætla eisini at fáa stig burtur úr øðrum dystum, sigur Bill Jacobsen, venjari hjá B68.

Og fyrsti møguleikin fyri at vinna eitt ella fleiri stig er í Gøtu mánakvøldið. B68 hevur mesta fólki tókt. Kári Hansen, sum er tøkur eftir leikbann aftur, gavst undir venjing hóskvøldið, men verður vónandi klárur til mánadagin. Tað sama er við brasilska álopsspælaranum Anderson, sum eisini fekk ein snudd undir venjing í gjárkvøldið.

**Magni og Sámal mangla**

GÍ manglar teir báðar mest royndu spælararnar hjá sær til dystin mánakvøldið. Magni Jarnskor er so illa plágaður av skaða í hælsinuni, at hann møguliga gevst fyri í ár. Sámal Joensen, sum hevur verið sannur brandur á miðvøllinum, hevur ikki spælt eftir summarsteðgin orsaka av skaða, og hann hevur framvegis ikki vant.

Sam Jacobsen fekk gult kort í dystinum í Vági, og hann hevur leikbann mánadagin. Hans Jørgen Djurhuus og Sverri Jacobsen høvdu báðir leikbann seinast, men teir eru tøkir til dystin ímóti B68.

## FM á gøtuni í Havn

**Eftir at fleiri súkklarar hava verið óhepnir á vanliga teininum til býarsúkkling, verður kappingin í ár flutt inn í Havnina**

SÚKKLING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Leygarmorgunin verður FM í býarsúkkling hildið í Havnini. Kappingin byrjar longu klokkan 8 leygarmorgunin, og kappast verður bæði hjá vaksnum og unglingum.

Hesa ferð verður teinurin eitt sindur øðrvísi, enn hann hevur verið hini árini, tá ið súkklað hevur verið á økinum uppi á Hálsi. Tórshavnar Súkklufelag hevur avgjørt at royna hesa nýggju rutu, eftirsum fleiri súkklarar hava verið óhepnir á økinum uppi á Hálsi.

Leygardagin, ella rættari leygarmorgunin kl. 08.00, verður koyrt inni í Havnini, og koyrt verður 50 km.

Mál og startur verður uttan fyri bygningin hjá Føroya Sparikassa Yviri við Strond. Koyrt verður eftir Strond, gjøgnum miðbýin, Skálatrøð, Sigmundargøta, J. C. Svaboesgøta, Velbastaðvegur, Marknagilsvegur, Ringvegur, Strond. Teinurin er góðar 10 kilometrar, og súkklað verður tí fimm ferðir runt í Havnini.

Kappingin er fyri unglingar og vaksin, og byrjað verður kl. 08.00. Allir luttakarar skulu møta kl. 07.30. Tilmelding verður á heimasíðuni hjá Tórshavnar Súkklufelag, ið er www.tsf.fo

# Nú skal TB sláa til

**Eftir eina góða gongd í fleiri vikur, sleppur 1. deildarliðið hjá TB veruliga at royna seg leygardagin. Liðið spælir ímóti B71 á útivølli, og dysturin kann gerast avgerandi fyri møguleikan at flyta upp í bestu deildina**

1. DEILD MENN
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Eftir eina vánaliga byrjan á kappingini, hevur TB seinastu vikurnar støðugt togað seg fram ímóti toppinum í næstbestu fótbóltsdeildini. TB liggur nú javnt við LÍF fýra stig aftanfyri AB, sum er næstfremst, og møguleikin fyri uppflyting er ikki langt burturi.

TB sleppur tó veruliga í eldin um vikuskiftið, tí liðið hevur dyst á útivølli ímóti fremsta liðnum í deildini, B71, ið liggur seks stig frammanfyri TB.

Dysturin á Sandi er ein stór styrkisroynd fyri liðið av Tvøroyri, og dysturin kann eisini fáa avgerandi ávirkan á møguleikan fyri uppflyting til bestu deildina. Tapir TB dystin, er tað skjótt, at liðið aftur er sjey stig aftanfyri uppflytingarplássini, og so verður tað tungt seinastu umførini.

AB, sum liggur næstfremst í løtuni, skal leygardagin spæla á útivølli ímót VB/Sumba, ið liggur undir niðurflytingarstrikuni. LÍF, ið er triðja liðið í toppinum, fær vitjan av HB, sum liggur mitt á stigatalvuni væl aftanfyri toppliðini.